# Almenn áheitan á løgtingsformannin um at skipa fyri Kvinnutingið á Føroya Løgtingi



HEIDI PETERSEN
Løgtingskvinna

Harra Edmund Joensen, løgtingsformaður.

Eftir eina sera væleydnaða og væl fyriskipaða roynd at skipa fyri Ungdómstingið á Føroya Løgtingi í vetur, fari eg at heita á løgtingsformannin um eisini at skipa fyri, at eitt Kvinnuting verður hildið á Føroya Løgtingi í hesum árinum.

Nú samgongan er samd um at arbeiða fyri at økja um leiklutin hjá kvinnum í politikki, hevði verið hóskandi eisini at tikið táttin upp á Føroya Løgtingi, og er hetta eisini í trá við niðanfyri standandi samtykt sum løgtingið gjørdi 20. oktobur 2005 har millum annað stendur soleiðis:

*"Løgtingið tekur undir við, at landsstýrismaðurin setur eina nevnd at arbeiða fyri, at kvinnur fáa ein øktan leiklut í at taka politiskar avgerðir.*

*Nevndin skal skipa fyri tvørpolitiskum tiltøkum til tess at økja um leiklutin hjá kvinnum í politiskum avgerðum, so talið á kvinnum á Løgtingi og í kommunustýrunum økist, og umboðanin samsvarar á leið við umboðanina í hinum Norðurlondunum.*

*Endamálið við hesum uppskoti til samtyktar er at seta eina nevnd, sum skal skipa fyri tvørpolitiskum tiltøkum til tess at økja um talið á kvinnum á Løgtingi og í kommunustýrunum kring landið. Vónandi kann eitt úrslit av hesum arbeiði verða, at umboðanin á leið verður í samsvari við umboðanina í hinum Norðurlondunum, sum er væl hægri enn í Føroyum.*

*Í Altinginum eru 28,5% kvinnur, í Fólkatinginum eru 36,9% kvinnur, í Ríkisdegnum eru 45,3% kvinnur, í Stórtinginum eru 36,4% kvinnur og í Landstinginum 35,4% kvinnur*

*Í Føroyum var kvinnuliga umboðanin á tingi eftir løgtingsvalið í 1998 12,5%, eftir løgtingsvalið í 2000 var kvinnuliga umboðanin 12,5%, og eftir løgtingsvalið í 2004 var kvinnuliga umboðanin 9,4%."*

Endamálið við einum slíkum Kvinnutingið kundi verið eins og við Ungdómstinginum har formaðurin so væl hevur orða setningin:

- at geva kvinnum størri innlit í fólkaræðið
- at læra kvinnur at vera ein virknari part av fólkaræðinum
- at vísa kvinnum í praksis, hvussu avgerðarmannagongdir virka í einum fólkaræði
- at geva kvinnum innlit í, hvør leikluturin hjá Løgtinginum er, og hvat arbeiðið hjá Løgtinginum fevnir um

Hetta verður gjørt við tí fyri eyga at varðveita og menna eitt virkið fólkaræði, og at tað framhaldandi kann vera ein liður í útbúgvingini og menning av kvinnum til at gerast virknar í politikki.

Sum løgtingsformaðurin í røðu síni tá Ungdómstingið var sett bar fram segði soleiðis :

***Demokratiið – fólkaræðið – er nakað av tí dýrabarasta, vit eiga. Fólkaræðið er ikki nakað, sum er givið einaferð fyri allar tíðir, ella nakað, sum kemur av sær sjálvum. Tað er ein skipan, sum øll dagliga mugu virka fyri, fara væl um og verja. Løgtingið sjálvt er hornasteinurin í okkara fólkaræði.***

Við hesum vælaorðum í huga fari eg at heita á formannin um at skipað verður fyri eitt Kvinnutingið í hesum árinum.

# Bumbur yvir Føroyum



BERGTÓRA HANUSARDÓTTIR
8. mars 2006

Nógv fólk minnast neyvt, hvar tey vóru stødd, hvat tey gjørdu, og hvat tey hugsaðu ta løtuna í 1963, tá ið tey fingu boðini um, at John F. Kennedy var bæði skotin og deyður.

Soleiðis var hjá mær ta ferðina, men eg minnist eisini í smálutum, hvar eg var stødd, hvussu alt var vorðið uttan um meg, og hvat eg hugsaði og føldi, tá ið útvarpið ein døgurðatíma fyri fáum árum síðani ein sólfyltan dag segði okkum frá, at Føroya løgmaður hevði givið amerikonskum bumbuflogførum loyvi at flúgva gjøgnum føroyskt loftrúm á veg til Afganistan í kríggj!

Við hetta fyrsta høvið vit fingu at vísa, hvørji vit í veruleikanum vóru, fóru vit eftir høvdinum beint í dýkið. Dirvisleys vaskaðu vit hendur í staðin fyri at rætta okkara medmenniskjum tær.

Og so blíva vit bara við og versna, eisini tá ið tað er greitt fyri øllum, hvat tað veruliga er, vit hjálpa okkara sameindu við, í øllum førum at døma eftir tí eftirlati sum meirilutin í uttanríkispolitisku nevnd Føroya Løgtings júst hevur samtykt framhaldandi at geva tí amerikanska herinum.

Einaferð var tó millum føroyskar og aðrar norðurlendskar kvinnur ein rørsla, ið kallaði seg Kvinnur fyri Friði. Tær skipaðu seg tvørtur um allar bólkingar í samfelagnum, tær kravdu, at vápnamilliardirnar vórðu brúktar til mat, og tær savnaðu upp á stutta tíð undirskriftir um alt landið frá meiri enn triðinginum av øllum kvinnum í Føroyum eldri enn 15 ár. Og síðani handaðu tær táverandi aðalskrivaranum í ST, Kurt Waldheim, alla rúgvuna á Altjóða Kvinnuráðstevnu ST´s, sum var hildin í Keypmannahavn í 1980.

Tá kundu føroyskar kvinnur saman við landsmonnum sínum ennisfattar styðja seg til tær einmæltu løgtingssamtyktirnar, ið kravdu, at Føroyar vóru verandi uttanveltaðar í øllum krígsstøðum.

Men hvørjum er tað nú, ið vit so altráð og tankaleys gera alt fyri at tekkjast og verða partur av? Hví bera vit okkum soleiðis at? Og hvussu ímynda vit okkum, at hesi viðurskifti við Føroyum sum íbundnum fíli verða í 2015?

# Helvtin av Føroya fólki útihýst



HEIDI PETERSEN
Løgtingskvinna

Hvussu langt eru vit komin ávegis í demokratiseringsprosessini í Føroyum anno 2006 kunnu vit av røttum spyrja?

Hvussu langt ætla vit okkum at koma víðari í menningini av samfelagnum við visjón 2015, tá nærum helvtin av Føroya fólki er útihýst uppá forhond?

Hvussu skulu vit fáa fjølbroytni og nýhugsan inn í nakra ætlan tá visjónsbólkarnir eru "mannaðir" við 75 % monnum og bert 25 % kvinnum?

Hvussu ætlar Føroya løgmaður at náa málunum um heimsins fremstu tjóð 2015, tá hann gongur á odda í útihýsanini av helvtini av teimum menniskjaliga tilfeinginum vit hava í landinum? Við 7 monnum í landsstýrinum, sum hann sjálvur setur, 4 monnum í løgtingsins formansskapi, 7 monnum sum formenn fyri tingnevndirnar í løgtinginum, 6 monnum sum formenn í flokkunum á tingi, og vit kundu hildið á fram í einari langari røð afturat, og svarini vóru tey somu.

Hesar og nógvar aðrar spurningar kunnu vit seta landsins leiðara. Men vera teir svaraðir á nøktandi hátt? Neyvan. Onkur hissini undanførsla og seinast, ein nevnd sum skuldi stuðla uppundir øktan leiklut hjá kvinnum í politikki, har løgtingskvinna, sum var vald at standa á odda fyri arbeiðinum, mátti lata sessin frá sær, tí hetta var ímóti stýriskipanini. Um nakar politiskur vilji var at gjøgnumføra hetta arbeiði, so kundi løgtingið valt t.d. grein 25 nevnd at gera tað, men enn er onki hent.

**Hvar er demokratiið ?**

Tá spurt verður um vit á Føroya Løgtingi sleppa at taka støðu til hættir at bøta um kvinnuumboðanina í tinginum, verður hetta blankt avvíst. Bæði frá landsstýrismanninum, men eisini við breiðum stuðli frá tingmonnum. Altso í parlamentinum, sum hevur lægstu kvinnuumboðan í øllum Skandinavia, sleppa vit ikki ein gang at hava orðaskifti um og taka støðu til hvussu demokratii kann mennast og helvtin av Føroya fólki kann fáa størri politiska ávirkan.

Ikki fyrr enn kvinnur og menn í samfelagnum í felag síggja týdningin av at hava eina so fjølbroytta umboðan í valdsbýtinum sum til ber, kunnu hesi viðurskifti broytast.

Hvussu hetta kann gerast eru nógv boð uppá. Eitt uppskot er at gera Føroyar til eitt valdømi tí á tann hátt javnsetur tú allar atkvøðurnar í landinum og harvið bøtir tú um møguleikan hjá kvinnunum tí nú er tað hjá teimum stóru flokkunum í øllum førum 7 og 8 fólk sum vera vald, og uppá landsbasis eru altíð kvinnur millum hesi 7, 8 fólkini.

Ein annar háttur er at krevja at tað verður uppstilla javnt av báðum kynum á øllum listum til løgtingsval. Hetta verður eisini mett at bøtt um støðuna, men er kanska meira ivasamt.

Raðfesta valevnini á listunum hjá flokkunum áðrenn valið, verður gjørt í Íslandi við góðum úrslitið, og kundi kanska verið eina roynd vert.

Og so er eisini møguleiki at geva veljarunum tvær atkvøður í part, og hevði hetta verið eitt amboð at javna umboðanina í mun til atkvøðurnar.

Samanumtikið, er politiskur vilji at bøta um demokratiið, eru møguleikarnir nógvir, men fyritreytin er, at loyvt verður at skifta orð um henda spurning javnsett við aðrar politiskar spurningar í føroyska samfelagnum.

# Ikki loyvt at sláa børn

**Uppskot fyri tingið um at avtaka revsilsisrættin hjá foreldrum.**



HEIDI PETERSEN
Løgtingskvinna

**Rættindi hjá børnum**

Søguliga gongdin í broytingin í rættindum og skyldum hjá børnum, hava verið nógvar og umfatandi seinastu øldina.

Frá at hava verið roknaði sum ognarlutir hjá foreldrum, har børnini skuldu vera við sum arbeiðsmegi at breyðføða familjuna, og foreldur gjørdu við tey sum teimum lysti, til seinni, har foreldrum var álagt at senda tey í skúla, og til okkara tíð, har øll børn hava rætt til skúlagongd og útbúgving, og foreldur hava lógarásettar skyldur at forsyrgja barninum til tað er 18 ár, er stórt framstig.

Orsøkin at leggja uppskot fyri tingið at lóggeva móti revsilsisrættinum eru mangar, men høvuðsorsøkin er eftir míni metan, at tað er ein fyritreyt í virðingina av tí einstaka menniskjanum, at tú ikki fremur harðskap, hvørki likamligan ella sálarligan.

Tá børnini altíð eru tey veikastu í støðum mótvegis teimum vaksnu, eigur teimum at vera lógartryggja verja móti ágangi. Í dag hevur tú ikki loyvi at sláa ella fremja harðskap móti øðrum vaksnum menniskjum. Eisini djórini eru vard av einari djóraverndarlóg, men enn eru børn okkara ikki vard í nakrari lóg móti at verða sligin ella útsett fyri øðrum likamligum harðskapi.

Á ungdómstinginum í februar í ár løgdu næmingar frá 9. a í Eysturskúlanum fram uppskot um at avtaka revsilsisrættin og vóru argumentini tey førdu fram í sambandi við lógaruppskotið bæði nógv og góð, tey søgdu m.a. :

*Tað er ósunt fyri børnini at verða sligin! Børnini læra, at harðskapur er ein háttur at loysa trupulleikar/konfliktir uppá! Børn eru veikari og kunnu ikki verja seg! Hvar er markið fyri, nær talan er um harðskap og um varisliga likamliga revsing? Børnini missa sjálvsálitið og fáa sálarlig arr! Tað er loyvt at sláa børn, men ikki djór og vaksin fólk! Foreldrini eiga at verja barnið – barnið er ikki teirra ogn, tí fólk kunnu ikki eigast! Børn hava rætt til virðiliga viðferð! Vaksin, sum sláa børn, skulu á skeið í at vera foreldur! Tað er mannminkandi og eyðmýkjandi at verða sligin, bæði hjá vaksnum og børnum! Tað er tekin um veikleika ikki at kunna práta eitt barn í lag.*

**Verja móti harðskapi**

Eisini er tað ein mannarættur hjá børnum at vera vard móti harðskapi. Í ST barnarættindasáttmálanum frá 20 . november 1989 verður m.a. staðfest at staturin skal verja barnið um tað verður mishandla. Annars stendur nógv annað áhugavert í hesi somu yvirlýsing, eitt nú at børn hava rætt til privatlív og foreldur eiga til dømis ikki at lesa brøv hjá børnunum, børn hava rætt at vita hvat fyriferst í heiminum og tí eigur at hava atgongd til blød, sjónvarp, útvarp og bøkur, og børn hava rætt at hava sína egnu meining og hendan skal virðast. Meira um barnarættindasáttmálan kann lesast á heimasíðuni hjá *www.detsidsteord.dk*

Annars mælti Norðurlandaráðið í 1982 limalondunum at taka av henda revsilsisrætt.

Arbeitt verður í løtuni við uppskotið at leggja fyri tingi, sum skal avtaka revsilsisrættin hjá foreldrum av børnum teirra.

Í hinum norðanlondunum var hesin revsirættur avtikin við lóg fyrst í undangongu landinum Svøríki í 1979. Í Finnlandi var lógin avtikin í 1983 og í Noregi í 1987. 10 ár seinni var lógin so avtikin í Danmark, altso í 1997, og nú verður so høvi hjá Føroya Løgtingi at gera tað sama.

Vóni at uppskotið fær góða og jaliga viðgerð í løgtinginum, so vit eisini her kunnu teljast millum heimsins fremstu tjóðir.